# Smíða alibát til Íslands

**Á smiðuni Hydro Tech á Eiði eru teir farnir undir enn eina tvíkilju, sum brúkast skal í alivinnu. Men meðan tær flestu, sum fyrr eru smíðaðar, eru seldar í Føroyum og onkur einstøk í Skotlandi, skal hendan nýggja tvíkiljan til Íslands**

SKIPASMÍÐ
*Edvard Joensen*

**Eiði:** Føroyskt skipasmíð er sloppið inn á íslendska marknaðin. Fyri fyrstu ferð nakrantíð lata íslendingar stálskip smíða í Føroyum.

Talan er um eina tvíkilju, sum brúkast skal í íslendskari alivinnu, ið smíðað verður á smiðuni Hydro Tech á Eiði. Báturin er um 12 metrar til longdar og seks metrar breiður.

Í mun til hinar tvíkiljurnar av somu longd, sum Hydro Tech hevur smíðað, er hendan ein metur breiðari. Aðrir bátar hava kortini verið seks metrar breiðir, men so hava teir eisini verið eina tríggjar metrar longri. Teir hava ligið um teir 15 metrarnar til longdar, sigur Ólavur Asafson Olsen, stjóri á KJ Hydraulik á Kambsdali, sum eigur smiðuna Hydro Tech á Eiði.

Báturin, sum íslendingar skulu hava, er útgjørdur sum teir, ið Hydro Tech fyrr hevur latið. Hann hevur stóran krana, stóran spælkopp og dupulta fóðurkanón.

Tveir eru motorarnir í bátinum, og eru teir upp á góðar 200 hestakreftir hvør. Umframt er øll nútíðar nautisk útgerð umborð.

Ólavur A. Olsen sigur, at síðan Hydro Tech í september lat tann seinasta bátin til føroyingar - hann fór til Hera Hjelm í Vági - hevur einki bátasmíð verið fyr enn nú, íslendingar hava skrivað undir sáttmála.


*Tað er ein bátur av hesum slagnum. Hydro Tec nú er farið at smíða til Íslands*

Hetta felagið, sum skal hava hendan nýggja bátin, hevði áhuga í at fáa ein afturat. Men hava tó tikið fyrivarni og vilja bíða eitt halvt ár ella so í fyrsta umfari.

Men tó eru vónir fyri, at onkur annar íslendingur tekur við, tí eitt annað felag liggur framvið og er áhugað í einum báti, sigur Ólavur Olsen.

Um tann áhugin gerst til veruligan sáttmála, verður tann báturin so smíðaður, áðrenn ein møguligan nummar tvey verður gjørdur til felagið, sum í løtuni letur bát smíða á Eiði.

Talan er um eitt felag á Eysturlandinum, sum nú hevur gjørt sáttmála um bátasmíð við Hydro Tech. Felagið hevur aling og aliloyvi á Reyðafirði og Mjóafirði báðu megin Norfjørðin. Ólavur Asafson Olsen, sigur, at felagið Samherji á Akureyri, sum kent er í Føroyum í øðrum sambandi, eisini er partaeigari í hesum alifelagnum.

Umframt KJ Hydraulik og Hydro Tech vóru buðu norðmenn seg fram at smíða íslendska felagnum alibát. Men hóast teir eisini kundu bjóða fígging, tóku íslendingar av føroyska tilboðnum, sigur Ólavur A. Olsen stjóri á KJ Hydraulik, sum eigur Hydro Tech á Eiði.

# Heyganeshúsini niðurtikin

**Húsini hjá Ólavi á Heygum, Heyganeshúsini í Vestmanna, verða nú niðurtikin. Stórviðurin í elsta partinum verður goymdur**

BYGDARMYND
*Edvard Joensen*


*Í áravís hava Heyganeshúsini verið í ringum standi og einki kunna brúkst til.......*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Vestmanna:** Heyganeshúsini hvørva nú úr bygdarmyndini í Vestmanna. Partar av teimum verða tó goymdir.

Gomlu Heyganeshúsini vóru í so ringum standi, sigur Gunn Joensen, borgarstjóri í Vestmanna, at einki var at gera við tey annað enn at taka niður. Økið, har tey stóðu, fer í fyrsta umfari at liggja opið.

– Tað er sera trongligt í umráðnum, so brúk er fyri einum opnum plássi her, sigur borgarstjórin. Onkrir fyrispurningar hava verið um at sleppa at brúka økið, men víst er til øki aðrastaðni. Øðrum vinnuvirksemi, sum talan kann vera um, er gott pláss fyri Inni á Firði, og upp aftur rúmligari verður, nú ferjan um Vestmannasund fer at gevast at sigla. Eisini eru komnir onkrir fyrispurningar um at sleppa undir virksemi har inni, sigur borgarstjóin í Vestmanna.

Røddir hava verið frammi, sum vildu varðveita Heyganeshúsini. Gunn Joensen sigur, at avvarðandi myndugleikar hava eisini verið uppií, men úrslitið var, at einki nevnivert var at varðveita, og húsini eru ikki friðað.

Um bygningurin skuldi verið settur aftur í gamlan stand, fór tað at kosta milliónaupphæddir, sigur Gunn Joensen, og Vestmanna Kommunan gjørdi greitt, at tí kundi kommunan ikki bera kostnaðin av.

Tó vóru partar av tí, sum tikið er niður, tiknir frá og goymdir. Eitt nú útskeringar og annað, sum hildið var vert at goyma.

Tann parturin, sum nú verður tikin niður, er tann elsti av húsunum. Hann verður tikin sundur, og allur stórviðurin goymdur. Bygningurin verður avmyndaður, so hvørt tikið er uttan av, sigur borgarstjórin.


*........Nú er mestsum alt niðurtikið, og elsti parturin verður eisini tikin niður. Stórviður og annað, sum vert verður hildið at goyma, verður tikið frá*

*Mynd: Edvard Joensen*




*Leikstjórin Edward Zwick hevur gjørt hesa frásøguna, sum fer fram undir 1. heimsbardaga í harðliga landslagnum í Montana. Anthony Hopkins spælir William Ludlow, ein hugsjónarligur ovasti, sum er ósamdur um, hvussu herurin og kríggið fer við teimum innføddu. Av tí, at konan er farin frá honum, uppalir Ludlow sjálvur sínar tríggjar synir á tí óbygda landslagnum, bert við hjálp frá sínum innføddum vinum.*

*Leikarar: Brad Pitt, Anthony Hopkins, Aidan Quinn, Julia Ormond, Henry Thomas, Karina Lombard, John Novak, Kenneth Welsh o.o.*

**Bullworth**




**Borð um borð**




**Við Jógvani í Barmi**

